# Hildigunn í Smiðjuni



Hósdagin 14 apríl kl 14 letur Hildigunn Tausen upp listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík.

Hildigunn Tausen; sum er ættað úr Hovi, hevur altíð verið áhugaði í lit- og ljósspælinum í náttúruni, men ikki fyrr enn hon fór í gongd við eina fýra ára útbúgving sum psykoterapeut, har listamáling var eitt av útbúgvingargreinunum, varð áhugin fyri at mála vaktur.

Eftir lokna útbúgving í 2010 hevur Hildigunn Tausen nýtt so gott sum alla sína frítíð til listina, og hevur hon málað nógvar fjølbroyttar málningar. Hettar síðsta árið hevur Hildigunn gingið til listamáling hjá kenda fynska listamanninum Preben Beck og har lært ein hóp.

Málningarnir eru sprotnir úr gerandisdegnum, hugflog og kenslum her og nú.

Hettar er aðru ferð, at Hildigunn Tausen hevur listaframsýning. Hon hevur áður havt listaframsýning í læknahúsinum í Gelsted á Fyn.

Framsýningin heldur fram til 20. apríl og er opin allar dagar frá 10-18.



## Leita eftir vitnum til grovan harðskap



Løgreglan í Havn sóknast nú eftir vitnum, sum kunnu hjálpa teimum at loysa eitt mál um grovan harðskap.

Tað var um tvey tíðina sunnunáttina, at ein ungur maður brádliga, og uttan ávaring, varð álopin av fleiri monnum í Klubbagarðinum.

Hann fekk fleiri sløg í andlitið og small í asfaltið, men eftir tað fekk hann eisini eitt spark í høvdið, meðan hann lá.

Hann misti vitið og tað fyrsta, hann visti aftur til sín, sat hann inni í klubbanum, har onkur helst hevur hjálpt honum inn.

Álopið kom so óvæntað, at hann hevur ikki ánilsi av, hvørjir álopsmenninir eru, og løgreglan stendur tí fullkomiliga á berum.

Hann veit seg heldur ikki hava nakrar óvinir, og tískil hevur hann onga hóming av, hví hann skuldi verða álopin.

So hevur nakar sæð tilburðin frættir løgreglan fegin.

Maðurin fekk nakað av skaða. Ringast varð tað fyri hondina, og hann mátti leggjast undir skurð og fær tískil onki gjørt næstu tíðina.

# Føðingardagur við upplivingum til øll

**SAMSKIFTI** **Allir føroyingar eru bodnir í 10 ára føðingardagin hjá Vodafone leygardagin, har svimjihallir, bowlinghallir og skoytubreytin í Havn taka ímóti**




Eirikur Lindenskov

– Tíðin gongur við rúkandi ferð, og nú eru longu 10 ár gingin, síðani føroyingar fyrstu ferð kundu keypa telefoni og aðrar samskiftistænastur frá Vodafone, tá undir navninum Kall. Soleiðis skrivar Vodafone, sum heldur 10 ára føðingardagin, sum er í morgin 9. apríl, við einum stórum og landsfevnandi rørslutiltaki fyri føroysku familjuni.

– Á føðingardegnum kunnu allir føroyingar svimja, bowla ella renna á skoytum – púra ókeypis. Fólk kunnu svimja ókeypis í Sørvági, Leirvík, Vági, Tvøroyri, Fuglafirði, Toftum og í Klaksvík, sigur Vodafone.

Tað er bara at minnast til svimjiklæðir, handklæðir og svimjiringar o.a. til børnini. Upplatingartíðirnar eru tær, sum eru alment galdandi hjá nevndu svimjihylum. Fólk kunnu eisini bíleggja sær ein bowlingbana í ein tíma annaðhvørt í Tórshavn ella í Leirvík. Tími og bani eru ókeypis leygardagin. Og so er eisini kjansur at renna á skoytum á Tórshavnar Skoytibreyt kl. 9.00 - 15 leygardagin.

Hetta er samstundis síðsta útkall at royna skoytibreytina, áðrenn hon verður tikin niður fyri hesu ferð. Gloym ikki, at Vodafone hevur almenna móttøku í Skálanum í Norðurlandahúsinum nú fríggjadagin 8. apríl kl. 15 - 17. Vælkomin í føðingardag hjá Vodafone!

# Stórur amboðsdagur í Hoyvík

**FRAMSÝNING** **Mikudagin verður stórur demodagur í Handverkarabúðini hjá Bygma Balslev**




Magnus Gunarsson

Demodagur verður í Handverkarabúðini hjá Bygma Balslev mikudagin 13. apríl. Talan verður um eina sølu-framsýning við amboðum, har høvi verður at hitta nakrar av leverandørunum, sum sýna fram sínar vørur.

Á framsýningini hevur "Bacho" eitt breitt úrval av hondamboðum og sýnir fram amboð til bilbransjuna sum t.d. luftamboð og hydraulisk amboð. "Fein" kemur við einum demobussi, har teir sýna fram sítt stóra úrval av el-amboðum til nógv ymisk endamál. "Laser-Prof" hevur eisini nakrar nýggjheitir, sum t.d. rotatiónslasarar við grønum laserstrikum og fugtmátarar, sum gera tað lættari at finna svamp og hýgg. "Led Lenser" sýnir eisini fram teirra lummalyktir, sum eru kendar fyri kvalitet og ljósstyrki.

Konsulentur frá "Protox" sýnir fram teirra produktir og ráðgevur í sambandi við hýggj, svamp, insektir og tann ótýdliga luktin hesi geva frá sær sum t.d. Protox Hysan, sum er eitt nýtt slóðbrótandi danskt evni ímóti blámusoppi, ið ikki leggur eftir sær vandamikil evnafrøðilig evnir. Tískil hóskar tað væl til innanduranýtslu. Eisini eru onnur Protox produkt sum t.d. Protox Skimmel, sum er eitt væl dámt og munagott evni til fyribyrgjan av soppaálopi. Protox Insekt er munagott evni til at beina fyri og fyribyrgja skordýrum, í gomlum og nýggjum viði og Protox Svamp, sum er góðkent munagott evni til viðgerð av soppaálopi í viði. Sølutorgið verður mikudagin 13. apríl frá kl. 13-17.